# Familjan skal spyrjast

**Børn eiga ikki at verða flutt frá foreldrunum til eitt ókent umhvørvi uttan, at nærmasta familjan verður spurd eftir. Andrias Petersen heldur, at nærmasta familja hjá einum barni, ið er komið illa fyri, skal hava møguleika at taka sær av barninum, tí hon er í flestum førum besta loysnin fyri barnið.**

NÝGGJ BARNAVERNDARLÓGGÁVA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Javnaðartingmaðurin, Andrias Petersen, heldur, at nærmasta familjan hjá einum barni, ið er komið illa fyri, skal altíð spyrjast, um tey eru áhugað í at hjálpa barninum, áðrenn foreldrarætturin verður fluttur.*

*Modelmynd: Jens Kristian Vang*

Í umrøðuni av nýggju barnaverndarlóggávuni hevði javnaðartingmaðurin, Andrias Petersen, eitt rættiliga áhugavert sjónarmið. Andrias Petersen hevur í arbeiðsørindum verið á kanningarferð í Danmark, har tað millum annað varð nomið við barnaverndarøkið.

Hagtølini í Danmark vísa, at fleiri og fleiri børn verða árliga flutt frá foreldrum teirra. Danir hava ásannað, at tað er trupulleiki, og ynskja at gera okkurt málið

Andrias Petersen greiðir frá, at sviiar vóru í líkandi støðu í 80 árunum, og teir valdu eina eitt sindur øðrvísi loysn. Ein loysn, sum javnaðartingmaður metir eisini skal roynast í Føroyum.

– Áðrenn foreldrarætturin yvir einum barni verður fluttur til ókend fólk, hava sviar ta manngongd, at tey nærmastu, tað verið seg ommur, abbar, fastrar os. fr, verða altíð spurd, um tey eru áhugað í at taka sær av barninum, ið er komið illa fyri. Úrslitið av svensku royndunum hava verið sera góðar, og danir umhugsað nú at nýta somu skipan, fortelur Andrias Petersen.

Úrslitið av svensku skipanini hevur verið, hagtølini, yvir har foreldrarætturin verður fluttur, er nógv lækkað, tí barnið fær framhaldandi møguleika at veksa upp hjá nærmastu familju.

### Nógvir fyrimunir

Andrias Petersen heldur, at fleiri fyrimunir eru við svensku skipanini. Heldur enn at flyta eitt barnið frá sínum vanliga umhvørvi til eitt ókent stað, eiga vit at gera alt fyri, at barnið sleppur framhaldandi at verða í heimliga umhvørvinum.

– Tað er nógv best fyri barnið, at tað sleppur at vera í sama umhvørvi, har tað kennir fólkini, ið passa ein. Tað kann bara vera ein fyrimunur fyri barnið, at tað frammanundan kennir familjuna, hugburðin og umhvørvið. Hyggja vit eisini søguliga, so var vanligt, tá skip gingu burtur, at tey nærmastu tóku sær av børnunum, so vit hava ein tradition fyri hesum, sigur javnaðartingmaðurin.

Andrias Petersen er sannførdur um, at skipanin í Svøríki eigur at vera gjørd til fasta mannagongd í Føroyum Identiteturin hjá einum barni verður aloftast skaptur í barnaárunum, og tá er tað ómetaliga týdningarmikið, at barnið hevur so tryggar umstøður sum møguligt. Ein góður máti er altíð spyrja familjuna hjá viðkomandi barni, ið er komið illa fyri, um tey kunnu vera við til at tryggja barninum ein tryggari uppvøkstur, heldur Andrias Petersen.

Nýggj barnaverndarlóggáva:

# Gjalda men ikki valda

**Fyrsta viðgerð av nýggju barnaverndarlóggávuni var í tinginum mikudagin. Løgtingsmenn fýlast á, at kommunurnar bert sleppa at yvirtaka fíggjarligu byrðina á barnaverndarøkinum, uttan at tær sleppa einsamallar at umsita økið. Løgtingsmenn ynskja greiðari uppgávubýti millum land og kommunu, enn uppskotið frá Almannaráðnum leggur upp til.**

NÝGGJ BARNAVERNDARLÓGGÁVA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Nýggj barnaverndarlóggáva var til fyrstu viðgerð í løgtinginum mikudagin. Sammett við galdandi lóggávu, ætlar landsstýrismaðurin í almannamálum, Páll á Reynatúgvu, at fremja umfatandi broytingar á barnaverndarøkinum. Barnaverndin verður ikki ein landsuppgáva í framtíðini. Kommunurnar yvirtaka økið.

Barnaverndirnar kring landið skulu eisini mannast av faklærdum fólki. Higartil hevur hvør kommuna sær funnið hóskandi borgarar til at manna barnaverndina, men henda mannagongd fer nú í søguna.

Við yvirtøkuni fylgir fíggjarligi parturin eisini við. Kommunur hava higartil lagt út fyri landið á barnaverndarøkinum, og síðani fingið peningin afturgoldnan frá Almannastovuni. Í framtíðini fíggja kommunurnar sjálvar økið

### Meginbarnavernd

Heldur tilvildarliga valið av fólki í barnaverndum fer við nýggja uppskotinum í søguna. Útbúgvingin skal verða avgerandi fyri, um viðkomandi eigur pláss í eini barnavernd. Uppskotið hjá Almannaráðum leggur eisini upp til, at hvør kommuna framvegis hevur sína egnu barnavernd.

Ikki øll eru samd í, at hvør kommuna skal hava sína egnu barnavernd. Kommunusamskipan Føroya sigur í viðmerkingunum til nýggju barnaverndarlóggávuna, at hon metir, at barnaverndirnar áttu ikki verið fleiri enn níggju í tali, sum svarar til eina barnavernd fyri hvørja sókn.

Yvir øllum kommunalu barnaverndum verður ein sokallað Meginbarnavernd. Meginbarnaverndin skal liggja undir landsstýrismanninum, og uppgávan hjá henni verður at samskipa allar barnaverndirnar kring landið.

### Óheppið

Fleiri tinglimir vístu á í løgtinginum, at teir mettu tað verða óheppið, at barnaverndin í framtíðini bæði skal stýrast av landinum og kommununum. Tað varð ført fram, at skal barnaverndarøkið latast til kommurnar, so eiga kommurnar einsamallir at umsita økið.

Ætlanin við eini Meginbarnavernd undir landsstýrismanninum sendir eitt óheppið tekin til kommurnar um, at tær bert sleppa at gjalda, men kortini ikki at valda á barnaverndarøkinum. Løgtingslimir hildu fyri, at neyðugt er við einum greiðum uppgávubýti millum land og kommuna á barnaverndarøkinum.

### Tungt øki

Í løtuni kostar barna-verndarøkið góðar 50-60 mio. krónur árliga. Kommunurnar yvirtaka tískil eitt tungt øki. Fíggingin skal fáast til vega við hægri kommunalum skattaprosenti. Samsvarandi skal landið lækka sítt skattaprosent. kommunum. Eitt tal sum 0,9 % verður nevnt sum ein møguleiki. Hetta hevur við sær, at kommunurnar kring landið hækkað sítt prosent við 0,9%, men landið lækkar sítt skattaprosent samsvarðandi.



# SvF fer eftir børnunum

**Hol í høvdið, sigur ein sjónvarpshyggjari, ið er kravdur eftir trífaldum sjónvarpsgjaldi. Einki húski kann áleggjast meira enn eitt sjónvarpsgjald, stendur greitt í kringvarpslógini. Kortini er Sjónvarpið farið at krevja heimabúgvandi børnum eftir sjónvarpsgjaldi**

HYGGJARAGJALD
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*



*Ommur, børn og foreldur fyri seg. Tess fleiri búgva í einum húski, tess meiri vil Sjónvarp Føroya hava inn í hyggjaragjaldi*

– Hetta er alt ov galið. Sleppur Sjónvarp Føroya avstað við hesum, so skal okkara húski rinda 6000 krónur um árið í sjónvarpsgjaldi, og tað er tað bestemt ikki vert!

Soleiðis sigur ein bersøgin Niels Pauli Guðjónsson. Hann er ein teirra, sum í ólukkumát verður raktur av nýggja innkrevjingarháttinum hjá Sjónvarpi Føroya.

Tað er ikki meira enn eitt ár síðan, at øði stóðst av, at sjónvarpsgjaldið hækkaði úr 1600 upp í 2000 krónur. Nú vóru so aftur boð eftir fólki. Sjónvarp Føroya hevur sent bræv út til øll fólk, sum ikki eru skrásett sum hyggjarar. Tað, sum ger sonevndu »hyggjarakanningina« sermerkta er, at nú verða børn, sum búgva heima og eru yvir 18 ár og hava egið sjónvarp, eisini kravd eftir hyggjaragjaldi.

Tað vil siga, at búgva børn yvir 18 ár heima og hava sjónvarp á kamarinum, so skulu tey rinda 2000 krónur í sjónvarpsgjaldi. Býr omman í kjallaranum og hevur sjónvarp, so skal hon eisini rinda.

### Ein stór familja

Heima hjá Niels Paula Guðjónssyni við húski býr mamma konuna, sum er yvir 80 ára gomul, tí hon hevur onga aðrastaðni at búgva. Sonurin, sum júst er fyltur 18 ár, býr eisini heima og hevur sjónvarp á kamarinum. Sostatt skal húskið eftir ætlan sjónvarpsins rinda 6000 krónur um árið í sjónvarpsgjaldi. Eitt gott hál, tá hugsað verður um, at tey rindaðu 1600 krónur fyri einum ári síðan.

– Hetta er fullkomiliga hol í høvdið, tí vit síggja okkum sum eitt húski, ið er felags um alt hvønn dag. Vit eta saman og hyggja ofta sjónvarp saman, so tað gevur onga meining, at vit skulu rinda fyri trý. Sjónvarp Føroya er frammanundan einki at reypa av, og slapp eg undan at rinda tær 2000 krónurnar, so gjørdi eg eisini tað. Tað má eg liva við, men at rinda trífalt, tað er ovboðið, sigur Niels Pauli Guðjónsson.

Hann undrast eisini á, at sjónvarpið nýtir ein innkrevjingarhátt og Útvarpið ein annan, hóast talan er um somu lóggávu.

– Ímynda tær, at Útvarpið gjørdi tað sama? So skuldu vit rinda yvir 10.000 krónur um árið í lurtara- og hyggjaragjaldi. Heilt erligt, tað er ov nógv av tí góða, sigur Niels Pauli.



Vit loyva okkum vinarliga at senda tygum hetta skriv í samband við, at Sjónvarp Føroya er farið undir at gera enn eina hyggjarakanning. Vit gera kanningina, tí hyggjaraskrá okkara vísir, at tað enn eru húski, ið hava sjónvarp, men ikki eru skrásett.

**Børn, sum búgva heima og eru yvir 18 ár, og hava egið sjónvarp eiga eisini at lata seg skráseta.**

### Tulka lógina

Húskið hjá Niels Paula er ikki tað einasta, sum heldur Sjónvarp Føroya hava lopið framav. Yvirhøvur øtast fólk, men tey tora ikki at stíga fram av ótta fyri, at SvF bankar uppá.

Spurningurin er, at um SvF hevur loyvi til at gera, sum gjørt verður. Í lógini um kringvarp verður sagt, at »ongum húski kann verða álagt at rinda meira enn eitt sjónvarpsgjald«. Tað hevur Útvarp Føroya tulkað soleiðis, at eitt húski merkir eitt gjald. Markið gongur við, um ein íbúð verður leigað út.

Sjónvarpið hevur hinvegin valt at fara víðari. Farið verður eftir børnunum og eftir foreldrunum, um tey búgva hjá børnunum og hava egið sjónvarp. Tað hevur fingið ilt í tingfólk, sum tóku málið upp, tá løgtingið hevði ófráboðaðar fyrispurningar á skránni mikudagin.

# Tingfólk ilskast um innkrevjing

**Í so ágangandi. Tað heldur Jógvan Arge, formaður í Mentanarnevndini, um nýggja innkrevjingarháttin hjá Sjónvarpi Føroya. Børn yvir 18 ár, sum búgva heima, verða kravd eftir hyggjaragjaldi, og tað hevur fingið ilt í tingfólk flest**

HYGGJARAGJALD
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Innkrevjingin hjá Sjónvarpinum fekk mest umrøðu, tá Løgtingið hevði ófráboðaðar fyrispurningar á skránni mikudagin.

Tingmaður Javnaðarflokksins, Kristian Magnussen, vildi hava landsstýriskvinnuna við mentamálum at svara sær, um hon tók undir við átakinum hjá Sjónvarpi Føroya, har farið verður eftir fleiri hyggjaragjøldum í hvørjum húski.

– Í lógini verður sagt, at einki húski eigur at rinda meira enn eitt sjónvarpsgjald. Tað er síðan strammað upp í eini kunngerð. Øll trúðu, at nú fáa øll bara eitt gjald, men nú verður so farið eftir børnunum. Tað er onga aðrastaðni, at definitiónin er so smøl av einum húski, sigur Kristian Magnussen.

Landsstýriskvinnan við mentamálum, Annita á Fríðriksmørk, veik undan spurningin, um hon tók undir við tiltakinum. Hon segði seg ikki hava havt málið í sínum hondum, men segði tingfólk fáa høvi at viðgera kringvarpslógina í næstum.

### Í so ágangandi

Partamaðurin hjá landsstýriskvinnuni, Jógvan Arge, er formaður í Mentanarnevndini hjá løgtinginum. Hann tykist ikki glaður fyri framferðarháttin hjá Sjónvarpinum.

– Eg havi ikki hugt eftir lógum og reglum, og málið er ikki viðgjørt í Mentanarnevndini, men hetta fyrikemur mær í so ágangandi. Serliga aftaná ta stóru hækkingina, sum varð játtað teimum í fjør. Men annars er hetta eitt fyrisitingarligt mál, sum landsstýriskvinnan eigur at taka upp, sigur Jógvan Arge við Sosialin.

Hann er sjálvur programmleiðari í Útvarpinum, men hann heldur kortini ikki, at skeggið situr ov tætt høkuni í hesum føri.

### Tingmenn krevja svar

Fleiri tingmenn tóku harðliga til orðanna í tinginum mikudagin. Jógvan á Lakjuni úr Fólkaflokkinum, sum er fyrrverandi formaður í Mentanarnevndini, kravdi eina uppudding og segði, at Sjónvarp Føroya átti at verið steðgað beinanvegin. Partamaðurin Jákup Mikkelsen, sum áður hevur víst evninum áhuga, sigur somuleiðis, at hetta er púra burturvið.

– Tíðin hevur víst, at vit als einki hava fingið afturfyri, at sjónvarpsgjaldið varð hækkað. Tað er út um alt mark, um Tjóðveldisflokkurin, sum umsitur málsøkið, góðtekur framferðina hjá sjónvarpsstjóranum, og um ikki annað, so eiga vit at steðga hesum í mentanarnevndini, sigur Jákup Mikkelsen, sum er limur í Mentanarnevndini.

### Fakta

Løgtingslóg nr. 22 frá 1998

§ 20. Til Sjónvarp Føroya skal rindast sjónvarpsgjald. Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum ásetur í kunngerð nærri reglur um, hvør skal rinda sjónvarpsgjald, hvørji tól koma undir gjaldsskyldu, og nær gjaldsskyldan byrjar ella heldur uppat. Ongum húski kann verða álagt at rinda meiri enn eitt sjónvarpsgjald